Edmund Joensen, nýggjur tingformaður:

# Vil styrkja sjónarringin

**– Hetta arbeiði hevur mín stóra áhugi, og eg ætli at røkja hetta starvið sum eitt fulltíðarstarv, sigur Edmund Joensen, nývaldur løgtingsformaður. Hann ætlar at styrkja um tingið bæði in- og úteftir. Sjónarringurin hjá løgtingsnevndunum skal eisini styrkjast**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

*Edmund Joensen er nú løgtingsformaðurin. Eysturoyar- og sambandstingmaðurin hevur drúgvar royndir í politikki, og hann er við gott mót, nú hann tekur við tignarliga starvinum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Telefonirnar ringja á tamb hjá einum tí mest umsvermaða manninum í landinum júst nú. Vit vera noyddir at ringja aftur, uttan tó at hetta ger nakað. Og meðan vit tosa, so ringir telefonin aftur. Hesin nýliga valdi løgtingsformaðurin hevur sítt at síggja til, nú hann eftir dagar og nætur í Havn er farin heim, tá eingin fundur er á skránni. Tað er tó við einum nýggjum og týdningarmiklum heiti, at hann er farin heim til Oyrarbakka.

Edmund Joensen hevur drúgvar royndir í politikki. Hann varð fyri fyrstu ferð valdur á ting í 1988. Í 1991 gjørdist hann formaður í Sambandsflokkinum eftir Paula Ellefsen.

Í september mánað í 1994 varð hann valdur til løgmann. Eitt starv, ið hann røkti til 1998, tá Anfinn Kallsberg tók yvir í Tinganesi. Eisini varð hann valdur á fólkating í 1994, men hann náddi bert at sita har stutta tíð, tí boð vóru eftir honum sum løgmaður.

Hann er í løtuni varamaður á fólkatingi hjá Lisbeth L. Petersen, fólkatingslimi og forkvinnu Sambandsfloksins. Hann varð afturvaldur á ting 31. mai, og hann er nú eisini vorðin formaður fyri Føroya Løgting.

Hann er í dag 57 ára gamal.

### Stóran áhuga

Tað var fyrstu ferð, at hann ein løgtingsformaður varð valdur við minni enn meirilutanum av samlaðu atkvøðunum í løgtinginum.

Á fyrsta tingfundinum hjá nýggja Løgtinginum mikudagin var Edmund Joensen heldur ikki vísur í, um hann fór at gerast løgtingformaður ella ei.

– Eg visti ikki, at eg fór at verða valdur fyrr enn í tinginum, sigur Edmund Joensen.

Hann gjørdist eitt bilsin um, at hann fekk stuðul úr Sjálvstýrisflokkinum. Hann er tó glaður fyri henda stuðul.

– Eg haldi eisini, at tað var stórt og heiðurligt av Jóannesi Eidesgaard at skjóta meg upp sum formann, sigur Edmund Joensen.

Eftir formansvalið søgdu bæði Kári P. Højgaard og Jóannes Eidesgaard, at teir mettu Edmund Joensen sum ein virðiligan og góðan formann.

Arbeiði sum tingformaður hevur eisini stóran áhuga hjá Edmundi.

— Hetta arbeiði hevur mín stóra áhugi, og eg ætli at røkja hetta starvið sum eitt fulltíðarstarv. Eg havi altíð havt áhuga fyri hesum slag av parlamentariskum arbeiði, og eg havi eisini gjørt mær nakrar royndir, ið eg kann gera mær dælt av, sigur Edmund Joensen.

– Eg fari at arbeiða fyri øllum tinginum – bæði samgongu og andstøðu. Eg ætli at styrkja um Løgtingið ineftir og úteftir, sigur Emund.

Hann ætlar eisini at halda lív í og styrkja um tað samstarv, ið Løgtingið hevur við onnur ting, eitt nú Fólkatingi.

– Eg ætli eisini at vera við til at styrkja og víðka um sjónarringin hjá løgtingsnevndunum, soleiðis at tær eisin síggja, hvussu nevndir arbeiða aðrastaðni. Samstundis skulu tær eisini fáa best møguligu arbeiðsumstøður, sigur Edmund Joensen.

Hann og Finnbogi hava avtalað at hittast, soleiðis at Edmund kann seta seg væl og virðiliga inn í øll viðurskifti.

Edmund hevur eisini bara rós at bera sínum undangongumanni, Finnboga Ísakson. Sjálvur sat Edmund eisini í formansskapinum sum ein av næstformonnunum saman við Finnboga.

– Finnbogi hevur gjørt eitt gott arbeiði fyri tingið. Mær hevur eisini dámað ógvuliga væl mátan, ið Finnbogi hevur stýrt tingarbeiðinum við, sigur Edmund Joensen.

### Glaður fyri tingið

Nú Edmund Joensen er vorðin tingformaður, so er hann eisini vorðin leiðari fyri eitt mestsum spildurnýtt tinghús.

– Hóast alt ikki er liðugt enn, so haldi eg, at vit nú hava fingið rímiliga góðar umstøður til tingarbeiðið. Tað er munandi meira pláss, og tinghúsið er nú tingsalur burturav, sigur Edmund Joensen.

Enn resta byggistig í fyri at gera arbeiðið við tinghúsinum heilt liðugt, og hetta ætlar Edmund Joensen eisini at syrgja fyri verður gjørt.

Løgtingið verður 150 ár á ólavsøku, og tá verður hátíðarhald, har løgtingið m.a. fær vitjan uttan úr heimi.

## Løgtingsformenn

Síðani heimastýrislógina hava seytjan verið formenn fyri Føroya løgting. Talan er um sekstan menn og bert eina kvinnu, Maritu Petersen.

Av tingformonnunum hevur Jákup Frederik Øregaard úr Javnaðarflokkinum verið drúgvastur í sessinum. Í trimum ymsum tíðarskeiðum og tilsamans átjan ár sat hann sum tingformaður.

Fimm flokkar, Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, hava átt løgtingsformannin.

Yvirlitið yvir tingformenninar er hetta:

J. F. Øregaard, jv. 1948 - 29. juli 1950
Thorstein Petersen, ff. 29. juli 1950 - 15. des. 1950
Hákun Djurhuus, ff. 15. des. 1950 - 17. sep. 1951
Johan M. Poulsen, sb. 17. sep. 1951 - 4. des. 1958
J. F. Øregaard, jv. 4. des. 1958 - 7. jan. 1963
Sámal Petersen, sj. 7. jan. 1963 - 8. des. 1966
J. F. Øregaard, jv. 8. des. 1966 - 27. nov. 1978
Agnar Nielsen, sb. 27. nov. 1978 - 25. jan. 1979
Hilmar Bech, jv. 25. jan. 1979 - 23. sept. 1980
Jógvan Sundstein, ff. 24. nov. 1980 - 28. nov. 1984
Jacob Lindenskov, jv. 28. nov. 1984 - 03. mars 1987
Hergeir Nielsen, tj. 03. mars 1987 - 22. nov. 1988
Jógvan Sundstein, ff. 22. nov. 1988 - 18. jan. 1989
Hergeir Nielsen, tj. 18. jan. 1989 - 22. juni 1989
Agnar Nielsen, sb. 22. juni 1989 - 04. okt. 1990
Jørgen Thomsen, jv. 04. okt. 1990 - 15. jan. 1991
Anfinn Kallsberg, ff. 17. jan. 1991 - 21. apríl 1993
Lasse Klein, sj. 24. apríl 1993 - 28. juni 1994
Jógvan I. Olsen, sb. 20. juli 1994 - 19. sep. 1994
Marita Petersen, jv. 19. sep. 1994 - 29. juli 1995
Jógvan I. Olsen, sb. 29. juli 1995 - 15. mai. 1998
Finnbogi Ísakson, tj. 15. mai 1998 -15. mai 2002
Edmund Joensen, sb. 15. mai 2002 -

Kelda: www.logting.fo

Finnbogi Ísakson:

# Betri enn nakrantíð

**Fráfarni løgtingsformaðurin, Finnbogi Ísakson, hevði gott kunnað hugsað sær at roynt nýggja tingsalin, men hansara tíð er farin. Hann er tó fegin um nýggja tinghúsið, men hann vildi heldur reist eitt nýtt tinghús**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

*—Vit mugu framvegis miðja ímóti at gera eitt nýtt tinghús, sigur Finnbogi Ísakson, sum annars bert hevur rós til úrslitið av nýggja tinghúsinum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Løgtingið:** Ein av teimum, sum mikudagin kunnu líða á nýggju tingmanningina, nýggja tingformannin og ikki minsta nýggja tingsalin, var Finnbogi Ísakson. Seinastu fýra árini hevur Finnbogi verið tingformaður og sitið í tignarligasta sessinum í landinum. Hann hevur eisini verið tann, ið einamest hevur merkt kjakið og arbeiðið við at umvæla Løgtingshúsið. Mikumorgunin sat hann á áskoðaraplássunum.

— Eg eri væl nøgdur. Eg haldi, at arkitekurin (Heidi Poulsen, blðm.) hevur gjørt eitt gott arbeiði. Samanrenningin millum tað nýggja og tað gamla hevur eydnast væl, sigur Finnbogi Ísakson.

— Tað er vorðið rúmsháttari og luftigari. Arbeiðsumstøðurnar eru betri enn nakrantíð, sigur Finnbogi Ísakson.

Finnbogi Ísakson er ein teirri við teimum drúgvastu royndunum sum tingmaður. Hann hevur sitið í alt tretivu ár sum tingmaður, har hann eisini hevur landsstýrismaður partar av hesum tíðarskeiðinum. Hann var einans 23 ár, tá hann fyrstu ferð varð valdur inn á ting, og er hann næstyngsti valdi tingmaðurin nakrantíð.

Nú hann takkar fyri seg, so er greiður yvir sítt val, men honum hevði dámt at sloppið at royndt nýggja tingsalin. Hetta hevði hann eisini sloppið at royndt, um løgmaður hevði biðið um eitt formansumfar.

Finnbogi rósar eisini nýggju borðunum og innrættingini av húsunum. Hóast hann rósar arbeiðinum nógv, so er hann ikki í iva um, at tingið skuldi havt fingið eitt nýtt tinghús.

— Vit mugu framvegis miðja ímóti at gera eitt nýtt tinghús, sigur Finnbogi Ísakson.



# Merktu ótryggleikan á sínum egna kroppi

**Týsdagin merkti eitt húski á sínum egna kroppi, hvussu ótrygt tað hevur verið við sjúkraflutningi úr Suðuroynni ímeðan verkfallið hevur verið**

SJÚKRAFLUTNINGUR
*Áki Bertholdsen*

*Tað kundi verið hvør sum helst í kom í somu støðu sum vit, men tað má ikki henda aftur, sigur Erland Jacobsen á Tvøroyri*

– Hvat kundi hent, tori eg ikki at hugsa um. Men var tyrlan ikki tøk, kundi tað skjótt enda við eini vanlukku, bæði hjá mammu og barni.

Erland Jacobsen á Tvøroyri er ein av teimum mongu sum heldur, at tað má aldrin henda aftur, at útjaðarin í Føroyum aftur kemur at liggja avskorin frá Havnini, sum hann hevur verið hendan mánaðin, verkfallið hjá Skipara og Navigatørfelagnum vardi.

Tað, sum folk kring landið hava stúrt mest fyri, er, at ímeðan verkfallið var, hevur heldur ongin skipaður sjúkraflutningur verið. Strandfaraskipini hava ikki verið tøk til sjúkraflutning, men allar ringast hevur støðan verið í Suðuroynni, tí Smyril, sum plagar at liggja á Drelnesi um náttina, hevur ligið í Havn ímeðan verkfallið hevur verið, so har hevur rætt og slætt ongin bátur verið til taks.

Og hvussu ótrygg hendan støðan hevur verið, merkti Erland Jacobsen og hansara húski til fulnar.

### Í skundi

Dóttir Erland Jacobsen er við barn, men brádliga stungu trupulleikar seg upp. Hon varð flutt á Suðuroyar Sjúkrahús, har hon var løgd undir skurð og barnið tikið við keisaraskurði, hálvan annan mánað fyri, at hon annars skuldi eiga.

– Hóast tey á Suðuroyar Sjúkrahúsi gjørdi eitt gott og fyrimyndarligt arbeiði, varð mett, at tað var neyðugt at flyta móður og barn á Landssjúkrahúsið beinanvegin, sigur Erland Jacobsen.

Hann sigur, at tíbetur var tyrlan tøk, og tíbetur vóru floglíkindi, so tey vórðu flutt norðurum skjótt og væl.

– Men hetta var bara av tilvild, at tyrlan til alla lukku fekk flogið. Men, hvat kundi verið hent, vóru floglíkindi ikki, ella var tyrlan ikki tøk av øðrum orsøkum, torir hann ikki at hugsa um.

– Var hetta Dýra Biðidag, 26. apríl, tá ið tað var av ringasta veðri við kavaroki og stormi og tyrlan ikki fleyg, ella hevði tað verið so svart í mjørka, at hon ikki hevði fingið flogið, kundi hetta í ringasta føri enda við eini vanlukku, bæði fyri móður og barn, sigur Erland Jacobsen.

Hann sigur, at hesuferð lagaði tað seg lukkutíð soleiðis, at alt spældi av, men tað var so bara tí at tyrlan var tøk, og tað kundi akkurat tað sama laga seg øðrvísi, bæði av veðri, tekniskum breki, ella tí at tyrlan var bundin av øðrari flúgving.

### Má ikki henda aftur

Erland Jacobsen tekur tiskil fult undir við, at stig verða tikin til, at sambandið til útjaðaran við strandfaraskipunum verður tryggjað eisini tá ið ósemjur eru á arbeiðsmarknaðinum. Eitt nú kann tað gerast við at gera tey, sum eru knýtt at skipunum til tænastumenn.

– Tað kann væl vera, at tað kostar eitt sindur av pengum, at gera manningarnar til tænastumenn. Men tað kostar í øllum førum samfelagnum tíggju ferðir meiri at ein stórur partur av landinum í heilum liggur avskorin í so langa tíð, tí vinnan fær ikki virka.

– Men verður tað ikki gjørt, eigur tað minsta at vera, skipini liggja í útjaðaranum, tá ið verkfall er, so at tey altíð eru tøk til sjúkraflutning við stuttari freist.

Sjálvur hevur Erland Jacobsen røkt ferðasambandið ímillum Suðuroynna og Havnina í yvir 30 ár, tá ið hann sigldi við Smyrli.

Og hann er avgjørt ikki samdur við Strandferðsluni í at tað er tryggari fyri skipið, at tað liggur í Havn í eini verkfalstøðu, heldur enn í Suðuroy.

– Í verkfallinum hevur Smyril ligið við oljukeiina í Havn og tað man vera av ringastu brimplássum í landinum.

– Sama, hvar í Suðuroynni, Smyril lá, um tað var á Tvøroyri, ella í Vági, lá hann 10 ferðir tryggari har fyri veðri, enn hann gjørdi við oljukeiina í Havn, sigur Erland Jacobsen.

Tað eru eisini tey, sum hava roynt at gera lítið burturúr týdninginum av Smyril er tøkur í Suðuroy til sjúkraflutning, tí tey siga, at tað hevur ongantíð verið brúk fyri honum til bráfeingissjúkraflutning úr Suðuroy til Havnar.

– Hetta er ikki rætt. Sjálvur havi eg meiri enn einaferð verið við, tá ið Smyril hevur verið noyddur at sigla av Tvøroyri, norður til Havnar við sjúklingum, uttanfyri vanligu ferðaætlanina, sigur Erland Jacobsen, so tann støðan kann væl taka seg upp aftur, sigur hann.

Annars kann leggjast afturat, at bæði mamma og barn hava tað gott á Landssjúkrahúsinum…

# Tvøroyrar Kommuna sigur nei

**Tvøroyrar Kommuna góðtekur ikki semjuna, sum er gjørd ímillum Mentamálastýrið og Kommunusamskipan Føroya um savnsrøkt í skúlunum**

SAVNSRØKT
*Áki Bertholdsen*

*– Hetta er at skúgva útreiðslur hjá landinum yvir á kommunurnar, og tað kann ikki vera uppgávan hjá kommununum at taka yvir, har landsmyndugleikin hevur slept endanum, sigur Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri*

Tvøroyrar Kommuna fer ikki at seta semjuna í verk, sum Mentamálastýrið og Kommunusamskipan Føroya hava gjørt um savnsrøkt á skúlunum.

Hetta ger Finnleif Guttesen, borgarstjóri nú, púra greitt.

Annars hevði Mentamálastýrið og Kommunusamskipan Føroya, har Tvøroyri er limur, gjørt eina semju um, hvussu serhøli á skúlunum skuldi røkjast.

Eftir avtaluni skulu kommunurnar betala helvtina av útreiðslunum og mentamálastýrið hina helvtina.

Men Finnleif Guttesen sigur, at hendan avtalan er ikki bindandi fyri kommununar.

– Í Kommunusamskipan Føroya var full semja um, at tað skuldi standa til hvørja kommunu sær, um hon vildi skriva undir semjuna, ella ikki.

Og Tvøroyrar Kommuna hevur longu gjørt greitt, at hon fer ikki at skriva undir avtaluna, sum varð gjørd fyrr í vikuni, sigur Finnleif Guttesen.

Hann vísir á, at mentamálastýrið betalir alla savnsrøktina av teldustovunum.

Men eftir hesari semjuni skulu kommunurnar betala helvtina av røktini av øðrum serstovum, eitt nú til alis- og evnafrøði, smíðstovur o.s.fr.

Hann sigur, at hetta samsvarar ikki og nýggja avtalan, sum nú er gjørd, er at skúgva útreiðslur hjá landinum yvir á kommunurnar.

– Og tað kann ikki vera uppgávan hjá kommunum at taka yvir, har landsmyndugleikin hevur slept endanum

Hann sigur, at tað er landsmyndugleikin ið hevur gjørt ein sáttmála, sum ger tað ógjørligt at undirvísa og hann heldur ikki, at tað er ein uppgáva hjá kommunum at taka upp eftir vánaligum avtalum hjá landsmyndugleikinum.

Tær serstovur, sum eru umfataðar av semjuni, eru annars træsmíð, alis- og evnafrøði, tilevning, handarbeiði, náttúru/tøkni, lívfrøði, motorlæra, ítróttur og tónleikur.

Hinvegin eru bókasøvnini ikki við.

Jógvan Krosslá, formaður í Kommunusamskipan Føroya, sigur, at samskipanin kann ikki gera bindandi avtalur fyri kommunurnar og er talan um eykaútreiðslur, skal tað samtykkjast í kommununum. Tær kommunur, sum ikki vilja góðkenna nýggju avtaluna, eru sostatt ikki við í henni, sigur hann